# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Aftur til vælferðarhugsjónina

Hóast landsfundur Javnaðarfloksins ikki beinleiðis gjørdist ein back to basics manifestation, so eru bæði formansrøða og landsfundaryvirlýsing tað nærmasta flokkurin er komin til eina viðurkenning av, at sosialdemokratiska projektið ikki verður vunnið við óavmarkaðu og frælsu marknaðarkreftunum.

Formansrøðan og landsfundaryvirlýsingin eru áhugaverdur lesnaður eitt nú tí roynt verður at sameina búskaparlig fyrilit við sosialdemokratiska vælferðarprojektið. Tað er eingin lættur setningur. Tað er heldur ikki lætt at vera fíggjarmálaráðharri og javnaðarformaður í hesum døgum. Hinvegin munnu flestøll politiskt áhugað, uttan mun til politiska áskoðan, ásanna, at formaður Javnaðarfloksins við sínum drúgvu politisku royndum hevur teir førleikar, sum ein fíggjarmálaráðharri skal hava undir galdandi umstøðum. Føroyar eru higartil sloppnar lutfalsliga væl, um samanborið verður við onnur framkomin lond. Nøgv stendur á samgonguni til tess at finna semjur um ein politikk, sum kann tryggja undankomuna uttan at sosiala samhaldsfesti og vælferðin verða offrað. Formansrøða og landsfundarsamtykt eru tí ikki bert ein staðfesting av gamla javnaðarboðskapinum, her er eisini ein greiður boðskapur til borgarligu samgonguflokkarnar.

Formaðurin roynir at halda fast við vælferðarhugsjónina, men samstundis tónar hann forvæntningarnar niður. Tað ber illa til at lova gull og grønar skógir við 7-800 milliónum í halli á løgtingsfíggjarlógini. Formaðurin ger vart við, at ein framtíðartrygging av vælferðini krevur eina framtíðartrygging av føroyska búskapinum. Tað nyttar einki bert at hava fokus á vælferðina uttan eisini at hava fokus á búskapin. Hesi bæði viðurskifti hanga óloysiliga saman, sigur hann. Ein annar týðandi partur av sosialdemokratiska projektinum er sostatt eisini at tryggja ein sterkan búskap, sum kann fíggja vælferðina.

Henda ásannan formansins, reisir stóra spurningin: hvussu útvegar ein fíggingina av aktuellu vælferðarágóðunum og ikki minst hvussu fíggja vit ta stóra abjóðingina fyri framman nevniliga eldrabylgjuna, sum fer at ryggja um eini tíggju fimtan ár? Vit fáa ikki alt svarið, men nøkur ítøkilig boð. Staðfest verður, at tilvildarligar skerjingar á fíggjarlógini loysa ikki trupulleikarnar. Heldur skulu vit taka burtur útreiðslur, sum als ikki hoyra heima á einari fíggjarlóg, eitt nú stuðulsskipanir og bygnaðarligar skeivleikar. Ikki minst ræður um at útvega landinum størri inntøkur á samhaldsføstum grundarlag. Skattastigin skal gerast rættvísari, og harumframt eigur skattagrundarlagið at breiðkast við t.d. tilfeingisgjaldi, skatting av samfelagskaptum vinningi og umhvørvisgjøldum. Javnaðarflokkurin vil taka neyðugu stigini, bæði hvat viðvíkur inntøkum og útreiðslum. Uttan mun til, hvørja lagnu hesi stig fáa í eini samgongu við tveimum sterkt borgarligum og neoliberalum flokkum, so tykist Javnaðarflokkurin at hava lært nakað av lagnu brøðraflokkana í Europa. Teir sosialdemokratisku flokkar, sum halda fast við grundvirðini, vinna, hinir, sum loypa uppá neoliberala vongin, missa undirtøku.

**Sosialurin**

# Hvat er mest týðandi: Trygdin hjá suðuroyingum, ella fótbólturin?

**BERGUR JACOBSEN**

**Ella, nær er ein gøla ein gøla í Føroyum?**

Tað hevur nú frætst nakrar ferðir, at nýggi Smyril hevur fingið »black out«, ella sagt á føroyskum, at Smyril er »svímaður«, hevur mist vitið. Lítil hávi hevur verið gjørdur burturúr hesum málinum. Men, endiliga er ein tinglimur úr Suðuroynni kortini komin sum ketta burtur høvdatrogi, og hevur krævt at málið verður kannað.

Eg má siga at eg varð skelkaður tá eg fyristu ferð hoyrdi at Smyril var svímaður, og lá og rakst fyri vág og vind í nakrar minuttir, og eg havi verið enn meira skelkaður hvørjaferð hesi tíðindini hava endurtikið seg. Eg eri kortini neyvan hin einasti ið dugir at ímynda sær, hvat ið kann henda tá eitt risastórt ferðamanna- og farmaskip liggur og rekst fyri vág og vind millum oyggjarnar og inni á firðunum í Føroyum, ella hvussu?

Í mínum hugaheimi er tað ein risa gøla, ein ovurhonds gøla, at eitt spildur nýtt skip svímar fleiri ferðir, tí vit vita at sjálvt tíggju minuttir kunnu vera long tíð, tá vindur og streymur eru illa til vildar. Huksið tykum Smyril fullfermdan eitt illveðurskvøld á Tvørðafirði, fyri Dalsnýpuni ella Kirkjubøðnesi? Tað er óhugnaligt og skelkandi at huksa sær. Sjálv trygdin hjá suðuroyingum er í vanda, sjálv lívsæðrin hjá suðuroynni er hótt!

Hesum stendst eftir øllum at døma ongin gøla burturúr!! Men, nú nøkur atgongumerki til fótbólt í Suðurafrika eru seld á ein, kannska, ivasaman hátt, nú rudda teir forsíðurnar í bløðunum, og útvarpið sleppur at válka sær í teimum inkvisatorisku teknikkum teir kalla tíðindasamrøður. Tíðindini um atgongumerkjasøluna fáa teigar upp og teigar niður, og rúmligt rúm í loftbornu miðlunum, hóðast onki mannalív - hvørki trygdin ella lívið hjá føroyingum ella teimum sum keypa ella selja atgongumerkini, eru hótt!!

Er fótbólturin so nógv dýrabærari enn mannalív og trygdin og lívæðrin hjá suðuroyingum, at nøkur atgongumerki til fótbólt hava uppiborðið hundra ferðir meira rúm í fjølmiðlunum, enn »svímingarnar« hjá Smyrli?

Tað er ikki bara í Føroyum, at fjølmiðlanir gera hávastak og gølur burturúr tí sum lítlan ella ongan tídning hevur, meðan verulig álvarsmál fáa lítla ella onga viðgerð. Ábyrgdarleys og óbugvin fjølmiðlafólk eru at finna allastaðnis – men, tað fyrikemur mær, at støðan er serliga grell í Føroyum. Fjølmiðlafólk eru nú einaferð bara menniskju, hóast tey sjálvi stundum tykjast at hava eina aðra fatan!

At smálutir kunnu leggja land og lóggávuvald læmin, meðan sonn álvarsmál valla verða nevnd, ella fáas eina so grunna viðgerð at tað ikki munar, kann vera tekin um at tey sum manna fjølmiðlarnar í Føroyum ikki eru nóg búgvin!!

Skulu høvd rulla í samband við nøkur atgongumerki til heimsmeistarasdystir í fótbólti, so eiga høvd eisini at rulla millum tey, sum hava ábyrgdina av at Smyril ferð eftir ferð rekst fyri vág og vind, og er ein hóttan móti mannalívum og trygdini hjá suðuroyingum, og teimum annars, sum ferðast um Suðuroyarfjørð.

Smyril er ikki eitt trygt skip, og tað eigur at fáa fylgir! Ella ber alt til í Føroyum?

# Sjúkrakassagjaldið

**HØGNI HØJGAARD**

Tá uppskotið kom fram um at avtaka sjúkrakassarnar og taka gjaldið umvegis skattin, vóru mong sum fegnaðust um hetta. Serliga pensiónistar og láglønt annars. Hetta skuldi virka meira samhaldsfast. Breiðu herðarnar skuldu bera meir.

Til ásetta tíð skuldi broytingin fara fram, men hetta gjørdist eitt vónbrot. Tann broytingin, sum fleiri bíðaðu eftir, skal nú útsetast í tvey ár. Tá kann støða takast til, um gjaldið skal takast umvegis skattin.

Eitt er heilt vist, um login, sum nú verður løgd fram, ikki inniheldur tað sum henda skal um tvey ár, so hendir onki meir.

Fyri nøkrum døgum síðan bórust tíðindi í Kringvarpinum um eitt uppskot, sum skal leggjast fram.

Upplýst varð, at núverandi gjøld eru ymisk kring landið. Nú skal hetta javnast út til. at øll skulu gjalda somu upphædd og er hon sett til 245 kr. pr. mánað.

Samstundis varð upplýst, at núverandi upphædd í meðal er 227 kr. pr. mánað. Tað vil siga, at nýggja upphæddin gevur 18 kr meira pr. mánað. enn nú og gevur tað 216 kr. um árið fyri hvønn sjúkrakassalim.

Eg havi fingið upplýst, at limatalið er oman fyri 35 túsund.

Um vit ganga tølini upp, so gevur hetta umleið 7,6 millión um árið og yvir 2 ár fram til ætlaðu broyting 1/-12, verður inngoldið enn við núverandi skipan.

Mín spurningur til avvarðandi landsstýrismann er:

Hví skal krevjast meira inn hesi tvey árini, meðan bíðað verður eftir endaligu lógini?

Hvar skal hesin peningur nýtast til?

**NB!** Um uppskotið, sum nú liggur fyri, verður samtykt í verandi líki, so kemur enn einaferð tann tungi endin at venda niður.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.